Havnar Fimleikafelag:

# Vunnu, men kundu ikki vinna



*Smágenturnar hjá Havnar Fimleikafelag fingu ongar medaljur tá tær vóru í Danmark, men tó vóru tær ikki snýttar. Medaljurnar komu um hálsin tá tær komu aftur til Føroya*
*Mynd: Jens Kristian*

**Smágenturnar hjá Havnar Fimleikafelag var langt fremst í kappingini um Danmarksmeistaraheitið um vikuskiftið niðri í Kalundborg. Men av tí tær eru limir í Ítróttarsambandi Føroya og harafturat eisini gestafimleikarar, fingu tær onki heiðursmerki, hóast tær fingu heilt greitt nógv hægsta karakter**

FIMLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Fagnaðurin var stórur tá bussurin við gentum 10-12 ár kom aftur til Føroya mánadagin. Við fimleikahøllina á Stórheyggi var skipað fyri stórari móttøku, og har var ein rúgva av fólki komið saman at heiðra gentunum fyri teirra megnar úrslit í Danmark. Hornblástur, fløgg, blomstur, mussar og klemm í langar banar var afturvendandi uttanfyri fimleikahøllina tíðliga seinnapartin mánadagin. Og, ikki heilt uttan grund, vóru genturnar ovurfegnar og ikki sørt bilsnar av stóru móttøkuni.

– Ja, vit hava verið við í kappingini um Danmarksmeistaraheitið, men av tí at føroyingar hava ikki loyvi at vinna, so fingu vit onki heiðursmerki, sigur Inga Thorkildshøj, sum er venjari hjá smágentunum.

Inni í høllini varð borðreitt við smyrjibreyði og køkum, og eisini var ymiskt annað gott til tey ungu. Ein stór vøkur køka stóð á borðinum við áskriftini »Tillukku við sigrinum!«.

## Føroysk heiðursmerki

Av tí, at Havnar Fimleikafelag metti, at úrslitið hjá gentunum í Danmark var so mikið væl úr hondum greitt, hildu tey, at eftirsum tær vórðu snýttar fyri heiðursmerki í Danmark, so skuldu tær fáa eitt heiðursmerki nú. Eisini varð sagt, at ongin ivi var um, at í teirra eygum vóru tær heilt avgjørt Danmarksmeistarar, líkamikið, hvat reglurnar søgdu.

– Hetta var ein kapping í rútmiskum fimleiki, greiðir venjarin frá. – Tær skuldu gera tvær seriur. Eina í rútmiskum fimleiki, og so eina har bóltar vórðu brúktir. Í tí rútmisku seriuni fingu tær 8,8, meðan tær fingu 8,2 í hinari, og samanlagt gav hetta 17 stig. Tað liðið, sum varð Danmarksmeistari fekk 15,65 stig, sigur ein errin Inga Thorkildshøj.

– Sjálvandi eri eg glað teirra vegna, men ikki minst tær eru fegnar um hetta úrslitið.

Veitslurómurin í fimleikahøllini á Stórheyggi var stórur. Tá genturnar høvdu fingið heiðursmerki og blómur frá Havnar Fimleikafelag, fingu tær eisini eina rósu, sum eina heilsan frá Býráðnum, sum ikki vildi, at frálíka úrslitið skuldi fara óansað framvið. Eisini hevði 6. a í Eysturskúlanum yrkt ein sang til Havnar Fimleikafelag, har tey ynsktu teimum tillukku.

Sosialurin ynskir Havnar Fimleikafelag hjartaliga tillukku við úrslitinum í Kalundborg.




*Smyrjibreyð og køkur vóru á skránni eftir medaljuhandanina, og eisini var henda vakra køkan at síggja*
*Mynd: Jens Kristian*



*Ein stór mannafjøld var komin saman at fagna gentunum tá tær komu aftur á klettarnar mánadagin*
*Mynd: Jens Kristian*

## Vilja takka

Smágenturnar hjá Havnar Fimleikafelag vóru ógvuliga glaðar fyri túrin, sum var spennandi og gevandi. Tær vilja tí fegnar takka stuðlunum.

Teir eru: Kaupthing, Føroya Fimleikasamband, Havnar Timburhandil, Leif Mohr, Føroya Sparikassi og Havnar Fimleikarfelag.

**-ib**



Ferðaleiðaraskúlin Service & Co:

# Sakna føroyingar

**Danski ferðaleiðaraskúlin, Service & Co, saknar eitt føroyskt íkast til komandi skeiðini. Higartil hevur bert ein føroyingur biðið um upplýsingar viðvíkjandi ferðaleiðaraskúlanum, og eru tey ógvuliga skuffað av hesum**

FERÐAVINNA
*Ingrid Bjarnastein*




*Ferðaleiðaraskúlin Service & Co saknar føroyingar á skúlanum*
*Mynd: www.service-co.dk*

**Tjæreborg:** Skúlin hevur lýst í føroysku fjølmiðlunum, men áhugin fyri at sleppa á ferðaleiðaraskúla í er milt sagt ikki stórur. Danski ferðaleiðaraskúlin, Service & Co er einasti skúli av slíkum slag, sum hevur arbeiðstrygging. Hetta vil siga, at eftir lokna skúlagongd, so er tryggja tey tær mestsum eitt arbeiði innan ferðavinnuna og hjálpa tær við at koma uppá pláss.

– Vit hava havt nógvar føroyingar á skúlanum, men tað er ógvuliga ymiskt, hvussu nógvir føroyingar koma hvørja ferð, sigur Palma Olsen, sum sjálv hevur verið á ferðaleiðaraskúla, og sum nú arbeiðir hjá Ungrejs, sum er størsta ungdómsferðaskrivstova í Danmark.

– Hvørt ár skipa vit fyri fýra skeiðum, sum eru ávíkavist 4 og 5 vikur til longdar. Hesi skeið eru í Spania ella á Malta.

## Tænastan í hásæti

Tá tú fert á ferðaleiðaraskúla er tað tænastan, sum verður sett í hásæti. Og er hetta ein góður grundarsteinur fyri at sleppa víðari innan ferðavinnuna, tí á ferðaleiðaraskúla fært tú alla grundvitan sum er neyðug.

– Føroyingar eru annars stórt saknaðir á ferðaleiðaraskúlanum, greiðir Palma frá. – Danir eru eisini ógvuliga glaðir fyri føroyingar. Teir siga, at føroyingar eru meira álítandi, og ofta verður arbeiðið eisini gjørt betri, uttan ov nógv hóvasták. Føroyingar hava eisini tann fyrimunin, at teir duga betri at tosa norskt og svenskt enn danir, og harafturat duga teir jú flótandi danskt.

Fyri at sleppa á ferðaleiðaraskúla er einasta krav, at tú dugir at tosa enskt soleiðis, at tú megnar at hava eina samtalu, og at tú ert 18 ár ella eldri.

Um hetta hevur fangað tín áhuga, so fært tú meira at vita á heimasíðuni hjá Service & Co, www.service-co.dk ella við at senda teldupost á info@service-co.dk ella um tú heldur hevur hug at ringja, kanst tú ringja á telefon +45 70 211 222.

# Landið skal eisini taka rusk

**Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, heldur ikki, at tað er rætt, at kommunurnar einsamallar skulu bera kostnaðin av burturbeining av ruski**

RUSK
*Ingrid Bjarnastein*



*Steinbjørn O. Jacobsen leggur upp til at landið tekur sín fíggjarliga part av rakstrinum hjá brennistøðunum*

**Klaksvík:** – Landið fær allar inntøkur av vøruinnflutningi, tí kann tað ikki vera rætt, at kommunurnar skulu bera allan kostnaðin av at beina ruskið burtur, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

Hann sigur, at størsta kommunan í Interkommunala Renovasjónsfelagsskapinum, IRF, er Klaksvíkar Kommuna, sum fevnir um ein lítlan fimtapart av útreiðslunum hjá IRF.

– Hetta er ein stórur trupulleiki, sum nevnd og leiðsla í IRF hava arbeitt nógv við. Økta virksemið í samfelagnum gevur landinum fleiri inntøkur, meðan kommunurnar skulu beina ruskið burtur, og harvið bera tær eisini útreiðslurnar. Spurningurin er um býtið av inntøkum og útreiðslum millum land og kommunur.

## Væl rikin stovnur

Í Kommunuálitinum, sum flokkarnir á tingi hava sagt seg taka undir við, verður mælt til, at uppgávur, sum fevna um alt landið, eigur landsstýrið at umsita, meðan staðbundnar og borgaravendar uppgávur, eiga at verða røktar kommunalt.

– Kommunuálitið leggur upp til níggju stór øki, men tað er eyðsæð, at tú kanst ikki hava níggju brennistøðir. Tí verða brennistøðirnar meira til ein landsumfatandi øki, og eg haldi, at samsvarið millum útreiðslur og inntøkur hjá kommunum eigur at verða betri, og tað er har landið skal taka sín part. Eg sigi ikki, at landið skal yvirtaka brennistøðirnar, men kanska ein prosentpart, sigur borgarstjórin í Klaksvík.

Steinbjørn O. Jacobsen vísir á, at íløgur og sjálvur raksturin kostar, og hetta er vorðið til eina fíggjarliga byrðu hjá kommunum. Heilsufrøðisliga Starvstovan ásetur jú krøv, og tað kostar pengar at viðlíkahalda eina brennistøð.

Tó leggur borgarstjórin dent á, at hetta málið snýr seg ikki um raksturin av sjálvum felagsskapinum IRF.

– Vandi er altíð fyri trivnaðinum millum starvsfólki á einum slíkum stovni, tá politikarar og onnur alment skifta orð um stovnin. Eg vil leggja dent á, at vit tosa ikki um innanhýsis viðurskifti á stovninum. IRF er ein væl fyrimyndarliga rikin stovnur, og tað er týðandi, at hann framvegis fær frið at røkja sínar uppgávur, sigur Steinbjørn O. Jacobsen at enda.